Tit ringja — vit skriva
Er nakað á vási? — Ivamál?
Ein spurningur, ella tíðindi, so ring til okkara.
Vit eru til reiðar!

tíðindablaðið
sosialurin

Lýsingar:
Lýsingarmaður okkara er ráðgevari hjá fyritøkum og einstaklingum í lýsingaspurningum. Hetta verður gjørt uttan meirkostnað fyri lýsaran.

Í Samalandi eru eingir bókahandlar

Hetta kom fram á fundi sum Rithøvundafelag Føroya skipaði fyri á Landsbókasavninum

Á fundinum vóru trý umboð fyri norðuratlantisku smálondini boðin við. Hetta vóru fólk úr Íslandi, Grønlandi, Sámalandi umframt umleið 15 fólk úr Føroyum.

Umboð fyri hvørt landið sær greiddi frá umstøðunum hjá rithøvundum, sum hava tað til felags, at tey skriva fyri avmarkað tal av fólki, sum skilja ávísu málini.

Viðvíkjandi Sámalandi, so kom fyrsta barnabókin út í 1975, og hóast eingin bókahandil er í Sámalandi, so eru umleið 30 limir í Rithøvundafelag teirra. Av hesum er greitt, at tað er torført at fáa lesarar í talu.

John Gustavsen, samiskur blaðmaður og rithøvundi greiddi frá arbeiðsumstøðum teirra skrivandi í Sámalandi. Hann býr og virkar í Tromsø í Noregi, og hóast hann er av samiskum uppruna, so dugdi hann ikki hetta sermerkta mál fyrr enn hann var tilkomin. John Gustavsen hevur í mong ár virkað sum sendiharri fyri samar í útlondunum.

John Gustavsen sigur m.a.: »Skaldskapur er ikki bert bøkur, men eisini munnligar frásagnir, vísur og nýtsla av fjølmiðlum, tí tá røkka vit longri, samstundis sum vit varðveita sermerki okkara.

Til umrøðu var eisini bókaútgáva í ymsu londunum, og hvørjar umstøður arbeitt var undir.

Í Grønlandi er eitt bókaforlag, sum hevur prentsmiðju. Her verða allar grønlendskar bøkur prentaðar og útgivnar.

Grønlendarar hildu tó, at tað var ein vansi við hesum, tá nevndin í forlagnum var politiskt myndað, og at tað tí ikki vóru allir rithøvundar sum komu til orða. Grønlendingar hava tí í umbúna at stovna eitt alternativt forlag.

Íslendingar lógu á odda, hvat viðvíkur skipaðar umstøður fyri bókaútgávu. Teir høvdu forlag og geva hópin av bókum út árliga, eins og teir hava eitt sølulið, sum virkar serstakliga væl.

Ókent fyribrigdi viðvíkjandi bókaútgávu var skipanin í Føroyum, her fólk av sínum eintingum geva út og fíggja bøkur teirra. Hetta høvdu rithøvundarnir, sum vitjaðu í Føroyum, ongantíð hoyrt um áður.

Í so máta eru vit eftirbátar hvat viðvíkur bókaútgávum, men á annan hátt eru føroyingar betri fyri, tí øll skilja meira enn tvey ella trý fremmand mál.

Hetta er fyrstu ferð, at Rithøvundafelag Føroya skipar fyri slíkum tiltaki, og halda limirnir at nógv áhugavert kom burturúr og at samband er knýtt millum luttakararnar í ymsu londunum, sum kemur øllum til góðar í framtíðini.

Av týdningi fyri luttakararnar var, at samband varð knýtt millum londini, og var eitt umboð í hvørjum landi valt at senda tilfar og siga frá viðurskiftum teirra í ymsu londunum, so Rithøvundafeløgini altíð vistu, hvat hendi í hvørjum landi sær.

Annað úrslit av fundinum var uppskot um umseting av bókum í framtíðini. Hetta skal myndast á tann hátt, at t.d. ein sámisk bók verður umsett á øllum norðanlandamálum eitt ár, ein íslendsk næsta ár o.s.fr. Hetta kann vera við til, at vit skilja viðurskiftini hjá grannalondum okkara betri, sum vit hava tað til felags við, at málsøkið er avmarkað, og at fá fólk duga at lesa á hesum málum.

Dag.


— Þú áttir að stoppa þetta, Hólmfríður.
— Mamma, segi ég, hvernig átti hún að gera það?
— Alveg rétt, segir mamma, stattu bara með h
Hólmfríð upp.
Anker Worm námik uvdluínarne tai-
kisiánime pulaorkussalerne-
„Lægo din æmik nu h
Njavešæni buoc'cok: „Min æ
vas'tididdje: „Son læ hui
Ašesæni buoc'cok maida N

Óli í Áarstovu

Óforskammað av Marinplast ikki at taka Paula við til India, tá teir fóru álíkavæl.

— * —

Vit hoyra meira frá Føroya løgmanni uttanlands enn úr Tinganesi.

— * —

Pauli skal ikki vera so keddur, vit onnur høvdu heldur onki væntað av honum.

Gunnar Asholm vísir ljósmyndir í kommunuskúlahøllini í Havn mikukvøldið. Evnið er »Fortidsøglernes mysterier. Hør bibelens og videnskabens vidnesbyrd«. Ókeypis atgongd.

Lesið um ítrótt í
sosialinum

Setið peningin í
FØROYA SPARIKASSA
- fólksins peningastovn

Í Charlestown, havnabýnum hjá tí ríka býnum Boston í Amerika, er stórur handil við øll heimsins lond; Peer lærir seg handilsskap -

- og ikki er tað leingi, so eigur hann skip sjálvur.